# Brúktu meiri enn tvey ár um at viðgera eina umsókn

**Løgtingsins umboðsmaður átalar bæði Tórshavnar býráð og Fíggjarmálaráðið fyri at lata ein borgara bíða í meiri enn tvey ár eftir svari upp á eina umsókn**

ÁTALA
*Áki bertholdsen*

Tað er eigur als ikki at koma fyri, at tað skal taka tvey ár hjá almennum stovnum at viðgera eina umsókn frá einum borgara.

Tað heldur Løgtingsins Umboðsmaður.

Sostatt hevur hann enn einaferð átala almennar myndugleikar fyri langa viðgerðartíð.

Og enn einaferð er tað Tórshavnar Býráð, sum stendur fyri skotum- hesuferð tó saman við Fíggjarmálaráðnum.

Tað er ein borgari í Havn, sum hevði fingið nokk av Fíggjarmálaráðnum og klagaði fyri Løgtingsins Umboðsmanni.

Upprunin til klaguna er ein umsókn, sum hann sendi Fíggjarmálaráðnum á sumri í 2002 um at fáa skatt eftirgivnan.

Ein mánaða seinni fekk Tórshavnar Kommuna umsóknina til ummælis, tí talan var eisini um at eftirgeva kommunuskatt.






*Bæði Tórshavnar Býráð og Fíggjarmálaráðið hava fingið átalu frá Løgtingsins umboðsmanni fyri at hava brúkt tvey ár um at viðgera eina umsókn frá einum havnarborgara um at eftirgeva skatt*

Men tíðin gekk og onki svar kom frá Tórshavnar Kommunu. Og tá ið 14 mánaðir vóru gingnir, helt Fíggjarmálaráðið at stundin var komin at minna Kommununa á umsóknina.

Men heldur ikki hetta hjálpti!

So tá ið sjey mánaðir vóru gingnir afturat, minti Fíggjarmálaráðið enn einaferð umsitingina hjá býráðnum á, at svara umsóknini.

Góðar tríggjar mánaðir aftaná, viðgjørdi Tórshavnar Kommuna umsóknina.

Sostatt tók tað meiri enn tvey ár hjá Tórshavnar Býráð at gera viðmerkingar til eina umsókn um at eftirgeva skatt.

### Als ikki nøktandi

Løgtinsins Umboðsmaður heldur als ikki, at tað er nøktandi, at Tórshavnar kommuna nýtti meiri enn tvey ár til at viðgera eina umsókn um at eftirgeva skatt.

– Eisini átti kommunan at havt svarað Fíggjarmálaráðnum uppá tey bæði áminningarskrivini, ið ráðið sendi kommununi, sigur Umboðsmaðurin.

Annars boðaði Tórshavnar Kommuna Umboðsmanninum frá, at hon átók sær alla skyldina av óvanliga drúgvu málsviðgerðartíðina, og at hon sum so onga undanførslu hevði fyri hesum.

Umboðsmaðurin gav tískil Tórshavnar kommunu eina átalu fyri sera drúgvu málsviðgerðartíðina í hesum máli.

Tórshavnar kommuna boðaði eisini umboðsmanninum frá, at hon fór at endurskoða mannagongdirnar við tí í hyggju at stytta sum mest um viðgerðartíðina.

Hesum tekur Løgtingsins Umboðsmaður undir við og hann hevur biðið kommununa siga sær frá, tá ið mannagongdirnar vóru endurskoðaðar.

Men Fíggjarmálaráðið sleppur heldur ikki so.

Umboðsmaðurin metir nevniliga als ikki, at Fíggjamálaráðið hevði røkt sína uppgávu at fylgja málinum upp, soleiðis at umsóknin kundi avgreiðast.

Í tvey ár fekk Tórshavnar Kommuna bara tvey áminningarskriv frá Fíggjarmálaráðnum og tað er langt frá nøktandi, heldur umboðsmaðurin.

Men eisini Fíggjarmálaráðið tekur í egnan barm, tí tað hevur eisini boðað Umboðsmanninum frá, at tað er samt í, at viðgerðartíðin fór út um alt mark og kann undir ongum umstøðum góðtakast.

Løgtingsins Umboðsmaður er púra samdur í hesum og hevur tí eisini givið Fíggjarmálaráðnum eina átalu fyri drúgvu málsviðgerðartíðina í hesum máli.

Og eisini Fíggjarmálaráðið boðaði Umboðsmanninum frá, at ráðið hevði arbeitt við at leggja viðgerðina av umsóknum um eftirgeving av skatti í fastar rammur og samstundis stytta um viðgerðartíðina.

Hetta kundi Umboðsmaðurin bara taka undir við og hann bað eisini Fíggjarmálaráðið lata seg frætta, hvussu nýggja mannagongdin fór at roynast í komandi ári.

# Ferðafólk fingið eina bingju at vera í

**Á nýggju, stásiligu samferðsluhavnini í Suðuroy eru út av lagi vánaligar umstøður frá ferðafólki, sum eru til gongu. Ein 20 fót bingja, við plássi til eini átta fólk, er einasta farstøð til øll ferðafólkini**

FARSTØÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er synd at siga, at tet ferðafólk, sum ferðast umvegis nýggju samferðsluhavnina í Suðuroy, hava góðar umstøður.

Har er stórt og slætt øki til bilar. Verri er hjá teimum, sum eru til gongu. Tey sleppa ikki undir tak, hvussu veðrið so leikar í.

Tað er ikki heilt rætt at siga, at tey sleppa ikki undir tak. Tí ansar ein væl eftir, sæst ein lítil, blá bingja innast í einum króki á samferðsluhavnini. Og tað er í tí krókinum, sum er allarlongst frá ferðamannaskipinum.




*Hetta er einasta farstøð hjá teimum, sum ferðast til og úr Suðuroy: Ein 20 fót bingja í einum horni á nýggju samferðsluhavnini í Suðuroy. Nýggja Farstøð skal gerast, men hon verður neyvan liðug fyrrenn um eitt ár*

Hetta er altso farstøðin hjá suðuroyingum- ein 20 fót bingja. Inni í bingjuni eru gjørd sitipláss til eini 8-10 fólk. Men har er so eisini wc og har er varmi inni. Og troka fólk seg saman, er ivaleyst pláss fyri nøkrum fáum afturat.

Hetta var einasti hentleiki til tey ferðafólk, ið eru til gongu, sum ráðini vóru til í hesum umfari.

Í gomlu samferðsluhavnini í Drelnesi var heldur ongin farstøð, men har var ein skúrur, sum er tvær ferðir so stórur, sum hendan bingjan, sum nú skal látast at vera farstøð.

Men á Tvøroyri siga tey, at skúruin er so illa farin, at hann letur seg ikki flyta yvir á nýggju havnina, uttan at detta sundur. Tí er ein spildurnýggj, nýmálað bingja sett upp ístaðin við bæði varma, wc og einum træbonki til fimm, seks fólk at sita á og trimum leysum stólum afturat.

Har er eisini fólk frá kunningarstovuni á Tvøroyri, sum kunnu vegleiða ferðafólk í teimum ivamálum, tey hava.

Orsøkin til at hon stendur so langt burtur frá skipinum, er tað skuldi bera til at binda hana í kloakkina.

### Tað verður betri

Men suðuroyingar skulu ikki stúra, tí tað verður betri.

Ætlanin er at byggja nýggja farstøð á samferðsluhavnini á Drelnesi. Tað verður ein rættilig farstøð við sitiplássi til nógv fólk, lyftu til tey illa gongdu, kunningardiski og landgongd beinleiðis umborð á Smyril, akkurát sum í Havn.

Ein slík farstøð er mett at kosta fimm milliónir. Men á fíggjarlógini fyri í ár, eru tríggjar milliónir settar av til endamálið, sigur Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverk.

Og tað verður ikki heilt enn, at farast kann undir farstøðina.

Arbeiðið er bjóðað út og nú skal farstøðin projekterast. Men síðani verður tað neyðugt at broyta verklagslógina fyri samferðsluhavnina, so at hon eisini umfatar eina rættiligu farstøð.

Og tá ið alt tað er komið í rættlag, er tað spurningurin, hvussu verður við fíggingini. Fæst ikki meiri fígging í ár við eini eykajáttanarlóg, verður hon heldur ikki liðug í ár.

Undir øllum umstøðum kann ikki væntast, at tað verður klárt at fara undir arbeiðið upp á farstøðina, fyrrenn í heyst.

Tí er ikki væntandi, at hon verður liðug, fyrrenn tíðliga í komandi ári. Annars hevur tað verið nevnt, at hon skal gerast liðug í ár.

### Ikki Sumbingar men porkenningar

Ì eini grein um miðnámsskúlan í Suðuroy í blaðnum í gjár, komu vit at gera bæði sumbingum og porkenningum órætt.

Vit skrivaðu, at Hvalbiar Kommuna og Sumbiar Kommuna høvdu boðað landsstýrinum frá, at tær taka undir við ætlanini at flyta ætlaða miðnámsskúlan í Vági, til Hovs.

Tað er ikki Sumbiar Kommuna, sum hevur sent landsstýrinum slíka fráboðan. Hinvegin hevur bygdaráðið í Porkeri viðgjørt málið og hevur í grundregluni tikið undir við, at skúlin verður fluttur til Hovs.